# Kollfjarðabørn stuttleikaðu sær á trampolin

Veðrið hevur verið av tí allarfagrasta síðstu dagarnar, og tí hava flestu børnini spælt úti hesar dagarnar. Onkur hevur spælt í ánni, onkur hevur sparkað fótbólt, onnur hava grillað við familjuni, meðan uppaftur onnur hava verið úti og súkklað ella hugna sær í náttúruni.

Hugurin hjá børnunum at vera úti hevur sjálvsagt eisini verið góður orsaka av góða veðrinum, og eitt, sum sera nógv helst hava tykist við hesar deiligu sólskinsdagarnar, er at hoppa á trampolin.

Hesar stóru og eyðkendu trampolinirnar eru sera væl umtóktar millum børn og ung fyri tíðina, og koyrir tú ígjøgnum landið, so kanst tú síggja fleiri av hesum trampolinum.

Sosialurin var ein túr í Kollafirði í gjár og tók myndir av nøkrum børnum, sum hugnaðu sær ófført á hesum trampolinum, og eingin ivi er um, at trampolinirnar í øllum førum eru væl dámdar í Kollafirði. Har vóru ikki færri enn fýra slíkar trampolinir at síggja á einum heilt lítlum øki, so hetta er heilt víst nakað, sum børnum og ungum dáma avbera væl.



*Trampolinir eru blivnar sera væl umtóktar millum børn og ung síðstu tíðina, og í Kollafirði vóru ikki færri enn fýra slíkar trampolinir á einum lítlum øki.*



















